# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

23.februar fingu Sigga Jacobsen og Shakeel Jamil, London, ein son. Hann vigaði 3968 gr og var 55,5 cm langur.

1. mars fingu Martha I. T. Thomassen og Birgir Lauritsen, Miðvágur, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 4050.

2. mars fingu Kristbjørg J. Djurhus og Sonni L. Petersen, Runavík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

2. mars fingu Tórvild Østerø, Skálafjørður, og Tóroddur Vang, Glyvrar, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3800 gr.

4. mars fingu Ata Maria og Jimmy Blair, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 4200 gr.

6. mars fingu Gunhild Absalonsen og Dánjal Petur Nielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3150 gr.

6. mars fingu Ketty Thomassen og William Olsen, Sandavágur, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4000 gr.

8. mars fingu Lív Lützen og Óli Simonsen, Klaksvík, tvíburar, drong og gentu. Drongurin var 42 cm langur og vigaði 1750 gr. Gentan var 38 cm long og vigaði 1490 gr.

10. mars fingu Eileen og Gudmundur Hammer Egholm, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

11. mars fingu Sólvør K. Henriksen, Válur, og Sørin Djurhuus, Saltangará, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3550 gr.

## Tøkk



Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum á ymsan hátt gjørdu mær 90 ára føðingardagin tann 13. februar so ógloymandi.

**Tær bestu heilsanir**
**Eivind Gudmundsen, Sandavágur**

# Ólavur gevst sum lærari

Mánadagin 8. mars skipaði Skúlin við Ósánna í Klaksvík fyri hátíðarløtu fyri Ólavi Niclasen, ið nú fer frá sum lærari.

Ólavur, sum er føddur í 1947, fekk prógv sum lærari í 1971 og byrjaði sama árið sum lærari. Meginpartin av tíðini hevur hann verið í starvi í Skúlanum við Ósánna.

Við hátíðarhaldið bar Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, fram eina heilsan til Ólav frá býráðnum, har hon m.a. nevndi, at Ólavur sum ungur var ein av bestu fótbóltsleikarunum hjá KÍ, eins og í borðtennis, har hann eisini taldist millum teir bestu í landinum.



*Ólavur Niclasen, fráfarandi lærari, og Gunvá við Keldu, borgarstjóri*

*Kelda: www.klaksvik.fo*

# Margarinfabrikkin gávu frá sjavsleikarunum

Týskvøldið fekk Margarinfabrikkin í Havn ein kekk upp á 15.000 kr frá sjavsleikarum.

Hvørt týskvøld spæla eini 30 - 40 pør sjavs í kantinuni hjá Tórshavnar kommunu í gamla posthúskjallaranum. Eitt sera hugnaligt sosialt tiltak, har øll gjalda fyri seg og alt avlopið verður latið til vælgerandi endamál.

Hesaferð varð tað Margarinfabrikkin, sum fekk ein kekk upp á 15.000 kr, sum borgarstjórin Heðin Mortensen og varaborgarstjórin Bogi Andreasen, sum eisini er leiðari á Margarinfabrikkini, kvittaðu fyri.

*Kelda: www.torshavn.fo*



*Á myndini sæst Julianna Didriksen millum Heðin Mortensen, borgarstjóra, og Boga Andreasen, varaborgarstjóra og leiðara á Margarinfabrikkini*

Sosialurin -har tað hendir

## Dagurin

**12. mars. Grækarismessa**. Til minnis um tann tiltikna pávan, sum fekk navnið Gregorius hin Mikli. Hann doyði 12. marts ár 604. Grækarismessa er ein av teimum døgunum, sum boða várið. Um hetta mundið kemur flytifuglurin tjaldrið aftur, og av mongum verður grækarismessa eisini rópt tjaldursdagurin. Grækarismessuhald, at fagna tjaldrinum, er íkomið í nýggjari tíð.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*